Undirvísingartilfar
At ferðast á netinum

# Picture Perfect

*Grundspurningur:*

**Hvussu kunnu myndir verða viðgjørdar á teldu, og hvussu kann hetta fáa okkum at hugsa um okkara útsjónd?**

# Picture Perfect – Inngangur

Hetta heftið er nummar tvey í røðini av teimum seks tættunum til undirvísingartilfarið *At ferðast á netinum* og er til tín sum lærari, ið vil undirvísa og vegleiða næmingum at ferðast trygt á netinum.

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv til skilagóðan atburð, og hvussu vit tryggja okkara privatlív, og hetta er nakað sum tú, sum lærari, kann hjálpa við.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum tryggjar, at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið teir reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.




**Ábyrgd:** SSP-ráðgevingin.
**Útgivið:** 2017/2022.
**Málbólkur:** Miðdeild 4.-6. flokkur.
**Lærugrein:** Myndlist.
**Umbrotið, prentað og heft:** Føroyaprent.
**Samband:** Um tú sum lærari, foreldur ella fakfólk hevur spurningar ella tørv á vegleiðing til tilfarið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80

# Undirvísingargongd

| | |
|---|---|
| Skúlaár | |
| Skúli | |
| Floksheiti | |
| Floksstig | Miðdeild 4.-6. flokkur. |
| Lærugrein | Myndlist. |
| Lærari | |

| | |
|---|---|
| Heiti | At ferðast á netinum – Picture Perfect. |

| | |
|---|---|
| Undirvsingarmiðlar | Tilfar, sum er gjørt til hetta undirvísingarevni, næmingaskjøl og heimasetningur. |
| Førleikamál | **Støðisførleikar**<br>At samskifta, at kanna og at skapa<br><br>**Fakligir førleikar**<br>At lesa myndir, herundir:<br>• Á grundleggjandi stigi at vísa sín kunnleika um myndir sum frásøgu- og samskiftismiðil.<br>• Á grundleggjandi stigi at kanna, greina, bólka og meta um myndamál.<br>• Dugir at greiða frá myndabygnaði og sjónarhorni.<br><br>**Skrivligt sjónbært samskifti**<br>• At nýta sína vitan um myndir sum frásøgu- og samskiftismiðil. |
| Tímatal | Undirvísingartímar tilsamans umleið 20 tímar.<br>Til evnið picture perfect skulu nýtast 1-2 dupulttímar í myndlist. |
| Arbeiðshættir | Floksundirvísing, alnótin, bólkaarbeiði, skrivligar uppgávur framløgur og kjak. |

| | |
|---|---|
| Eftirmeting (sendast til SSP-ráðgevingina eftir útfylling) | Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin? |
| | Var tilfarið hóskandi? |
| | Var tímatalið hóskandi? |
| | Í hvønn mun rukku næmingarnir førleikamálunum? |
| | Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir? |
| | Uppskot til broytingar |

# Picture Perfect

## Grundspurningur:

Hvussu kunnu myndir verða viðgjørdar á teldu, og hvussu kann hetta fáa okkum at hugsa um okkara útsjónd?

## Samanumtikið:

Næmingar geva gætur, hvussu talgilt broyttar myndir kunnu ávirka, hvussu fólk hugsa um sína útsjónd, eins og tílíkar myndir kunnu hjálpa virkjum at selja vørur. Eftir at teir hava lært, at myndir kunnu broytast á telduni, verður tosað um, at myndaviðgerð bæði kann vera sera kreativ og eisini villleiðandi.

Næmingarnir síggja ein stuttan film, ið vísir broytingina av einari unga gentu uttan sminku til eina talgilt viðgjørda sjálvsmynd á Instagram. At enda arbeiða næmingar í bólkum, og hyggja at tveimum myndum, ið eru talgilt viðgjørdar.

## Lærusetningur:

Næmingar kunnu við hesum duga at:

- síggja, at myndir kunnu verða viðgjørdar talgilt og kenna fyrimunir og vansar við tí.
- tosa um, hvussu myndaviðgerð kann ávirka og broyta okkara sjálvskenslu.
- skilja, hvussu lýsingarheimurin nýtir myndaviðgerð til at selja vørur.

## Fyrireiking:

Finn myndina av litríku sitrónini (síða 10) fram og ger klárt til at vísa hana á skíggja.

Finn filmin um øvutu sjálvsmyndina fram ("Reverse selfie"), og ger klárt at vísa. https://www.youtube.com/watch?v=s1G7z_vlneM

Skriva út *Næmingaskjal 1* (síða 8) og *2* (síða 9) til bólkaarbeiði. Eitt skjal til hvønn bólk á 4-5 næmingum.

Skriva út *Heimasetningur* (síðu 11) sum børnini fáa heim við til foreldrini.

### *Upphiting: 10 minuttir*

Vís myndina av litríku sitrónini á skíggjanum, ella skriva myndina út.

Bið næmingarnar ímynda sær, at onkur hevur lagt hesa mynd á netið. Undir myndini stendur: „Um tú letur fruktlit í eina sitrón, sær hon soleiðis út!."

Lat næmingarnar atkvøða um, hvørt myndin er følsk ella verulig.

Greið næmingunum frá, at henda mynd varð broytt við einum telduforriti, tí sitrónir síggja ikki soleiðis út í veruleikanum – heldur ikki um tú letur fruktfarvu í.

**Spyr:** Sjálvt um sitrónin ikki er verulig – hvat dámar tykkum við hesari mynd?

- Leið næmingarnar til at skilja, at henda broytta mynd er eitt sindur gandakend. Hevði tað ikki verið kul, um tú skar eina sitrón í helvt, og allir ælabogans litir vóru í?

Sig teimum, at tað bæði kann vera stuttligt og kreativt at broyta myndir. Við telduforritum ber til at fáa støð, fólk og ting til at síggja út, sum hoyra tey heima í einum ævintýrheimi.

**Spyr:** Nú tit vita, at tað var eitt telduforrit, sum fekk sitrónina til at síggja soleiðis út, hvat halda tit tá um tekstin undir myndini?

- Leið næmingarnar til at síggja, at ein tílíkur tekstur kann lumpa fólk at trúgva onkrum, ið ikki passar.

**Spyr:** Hvat um myndin ikki hevði nakran tekst? Hevði hon kunnað lumpað fólk hóast tað?

- Næmingar eiga at vita, at summi fólk framvegis kunnu halda, at litríka sitrónin er verulig. Tey kunnu enntá halda, at onkrar sitrónir síggja soleiðis út frá náttúrunnar hond.

**Greið frá,** at tøkni loyvir okkum at broyta myndir upp á allar møguligar mátar. Tað kann vera stuttligt og kreativt og listaligt, men tað kann eisini lumpa ella snýta fólk til at trúgva onkrum, sum ikki passar.

*Uppgáva 1: 10 minuttir*

# Skaptur vakurleiki

Greið frá, at myndir av fólkum í bløðum, á plakatum og í lýsingum aloftast eru telduviðgjørdar. Hesar myndir fáa fólk at síggja øðrvísi út, enn tey gera í veruleikanum. Tað er tí, at fólkini handan bløðini og lýsingarnar vilja hava myndirnar at síggja út á ein heilt ávísan hátt.

Sig næmingunum, at teir nú sleppa at síggja eitt filmsbrot, har hetta hendir.

Vís teimum filmin um øvutu sjálvmyndina ("Reverse selfie") á Youtube."

Tosa um filmin og fá næmingarnar at siga frá onkrum, sum teir mintust í filminum. Okkurt ið teir serliga løgdu til merkis.

## Dømi:

- Hon verður nógv sminkað, og hárið verður sett.
- Hon nýtir filtur á telefonini til at fáa húðina at síggja øðrvísi út.
- Varrarnar og eyguni verða gjørd størri, og nøsin verður gjørd klænari.

### Spyr:

Halda tit, at lidna myndin á Instagram kann fáa ung fólk til at trúgva onkrum, sum ikki passar?

Bið næmingarnar samanbera myndina av sitrónini við myndina av gentuni á telduni. Hvørki gentan ella sitrónin síggja soleiðis út í veruleikanum.

Myndin á Instagram kann lumpa ung fólk at halda, at gentan sær soleiðis út í veruleikanum.

**Greið frá,** at tað er vanligt hjá okkum menniskjum at samanbera okkum við onnur. Onkuntíð, tá vit síggja onkran annan persón, antin í veruleikanum ella á einari mynd, so kunnu vit hugsa: „Síggi eg soleiðis út?" ella „Riggar hasin persónurin betur enn eg?" ella „Er tað soleiðis eg vil síggja út?" Men myndir á Instagram og øðrum sosialum miðlum eru aloftast broyttar, so tær rigga sera væl. So vit kunnu onkuntíð samanbera okkum við fólk, sum síggja sera gott út á myndum, men sum als ikki síggja soleiðis út í veruleikanum.

**Greið frá,** hvat ein vøra er.

### Spyr:

Um man fær onkran til at síggja sera væl út, kann tað hjálpa til við at selja eina vøru?

## Dømi:

- Leið næmingarnar at síggja sambandið millum, at vit hámeta lýtaleysu útsjóndina á myndini og tað, at vit fáa okkum sosialar miðlar og keypa vørur, sum skulu fáa okkum til at síggja betur út. Fólk, sum eru ótrygg um sína útsjónd, kunnu halda, at tey mugu keypa ella fáa sær ávísar vørur – til dømis sminku ella filtur – fyri at síggja gott út.

*Uppgáva 2: 20 minuttir*

# Gandamyndir

Lat næmingarnar sita í bólkum á 4-5. Í øllum bólkunum eru bæði dreingir og gentur.

Gev hvørjum bólki eitt eintak av *Næmingaskjal 1 og 2* (síða 8-9) um gandamyndir.

Gev bólkunum 10 minuttir til at svara spurningunum í skjølunum.

Lat eitt umboð úr hvørjum bólki siga frá teirra úrslitum. Tú kanst nýta hesi svardømi til at leiða kjakið:

Charli og Dixie D'Amelio á forsíðuni á Girls' life.

**Greið frá,** at hetta er eitt blað, sum nógvar ungar gentur ymsastaðni í heiminum keypa fyri at lesa um tey fólkini, sum tær hyggja eftir á sosialum miðlum sum TikTok.

### Spyr:

Hvat halda tit, at henda forsíðan sigur um, hvussu gentur skulu síggja út?

## Dømi:

Myndin sigur gentum, at tær skulu hava slætta húð uttan pirrur ella bumsar, brúka nógva sminku, vera klænar, vakurt hár og fáa nógv "likes" fyri at verða væl dámdur/populerur.

### Spyr:

Hvørjar vørur halda tit, at henda forsíðan kann vera við til at selja?

- Næmingarnir skulu gjarna koma fram til, at tað eru vørur, sum fáa teg til at síggja øðrvísi út – so sum sminka, klæði og Photoshop, ið kann broyta andlit og húð.

### Spyr:

Hvørjum kenslum halda tit, at ein genta kann sita við, tá hon hevur hugt í hetta blaðið?

- Næmingarnir eiga at skilja, at um gentur síggja nógvar myndir, greinar og lýsingar av hesum slagi, so kann tað fáa tær at kenna seg ótryggar um sína útsjónd. Kanska tær halda seg vera ov tjúkkar, ella at tær hava ikki nóg slætta húð ella skínandi hár. Ella kanska halda tær, at tær mugu hava nýggj klæðir ella fleiri „likes“. Tær kunnu halda, at tær mugu keypa ymsar vørur fyri at síggja betri út enn tær gera.

Cristiano Ronaldo á forsíðuni á Men's Health, sum er eitt blað, ið er mest ætlað monnum og viðger evni um heilsu, venjing, móta og seksualitet.

### Spyr:

Hvat halda tit, at henda forsíðan sigur um, hvussu dreingir skulu síggja út?

## Dømi:

- Myndin sigur dreingjum, at teir skulu vera klænir og vøddamiklir. Hárið skal vera sett, og teir skulu vera sólbrendir.

### Spyr:

Hvørjar vørur halda tit, at henda forsíðan kann vera við til at selja?

Næmingarnir skulu gjarna koma fram til, at flestu lýsingar í hesum blaði allarhelst høvdu verið við vørum, sum siga seg hjálpa tær at gerast klænur og vøddamikil, so sum vegleiðingar til at fáa búkvøddar sum Ronaldo upp á 28 dagar, venjingartól, hárvørur o.s.fr.

### Spyr:

Hvørjum kenslum halda tit, at dreingir kunnu sita við, tá teir hava hugt í blaðið?

- Næmingar skulu helst skilja, at tá dreingir síggja nógvar slíkar myndir, greinar og lýsingar, so kunnu teir ivast í, um teirra útsjónd er í lagi. Teir kunnu halda, at teir eru ov tjúkkir ella ov klænir, at teir hava ov smáar vøddar, ella at húð og hár ikki eru perfekt. Teir kunnu halda, at teir noyðast at keypa vørur til at betra um útsjóndina.

## *Samanumtøka: 5 minuttir*

Hesir spurningar kunnu nýtast til at meta um, hvørt næmingarnir hava fatað lærusetningin.

### Spyr:

Hvat merkir tað at viðgera eina mynd?

- Tá tú broytir eina mynd, broytir tú tað, sum er á myndini. Teldu- og telefonforrit geva okkum alskyns hættir at rætta og at broyta myndir.

### Spyr:

Hvørir fyrimunir og hvørjir vansar eru við myndaviðgerð?

- Fyrimunirnir eru til dømis, at tøknin loyvir okkum at viðgera myndir, so at tær minna um okkurt, sum bert er til í okkara hugflogi. Men um vit samanbera okkara útsjónd við kend fólk á viðgjørdum myndum, sum eru veruleikafjarar, so kunnu vit gerast kedd, tí vit ikki eru nóg vøkur.

### Spyr:

Hví munnu so nógvar myndir í bløðum og lýsingum vera viðgjørdar? Hvussu kann tað at viðgera eina mynd, hjálpa til at selja vørur.

- Myndirnar verða viðgjørdar, soleiðis at fólkini á myndini liva upp til normin, ið vit í dag kalla vakurleika. Onnur, sum síggja hesar myndir við lýtaleysum fólkum, vilja fegin síggja út sum tey á myndini og fáa hug at keypa vørur, sum lova at gera tey vøkur.

*Næmingaskjal 1*

# Gandamyndir

Hygg at forsíðuni á blaðnum og at vanligu myndunum av Charli og Dixie D'Amelio.

1. Tosið um, hvussu myndirnar eru ymiskar.

2. Svarið spurningunum.




*Soleiðis síggja Charli og Dixie D'Amelio út uttan telduviðgerð*



Hvørjar lýsingar halda tit vera í hesum blað?

Hvat sigur henda forsíða um, hvussu gentur og kvinnur skulu vera og síggja út?

Hvørjum kenslum munnu kvinnur og gentur sita við eftir at hava sæð blaðið?

*Næmingaskjal 2*

# Gandamyndir

Hygg at forsíðuni á blaðnum og at vanligu myndini av fótbóltsleikaranum, Cristiano Ronaldo.

1. Tosið um, hvussu myndirnar eru ymiskar.

2. Svarið spurningunum.






*Soleiðis sær Cristiano Ronaldo út í gerandisdegnum.*

Hvørjar lýsingar halda tit vera í blaðnum?

Hví kann myndin av Ronaldo á gøtuni ikki nýtast á forsíðuni á blaðnum?

Hvat sigur blaðið um, hvussu menn og dreingir eiga at síggja út?

*Næmingaskjal 3*

# Gandamyndir

Um tú letur fruktfarvu í eina sitrón, sær hon soleiðis út!



# Heimasetningur
*– saman við foreldrum/vaksnum*

# Picture Perfect

Myndir, sum vit síggja á netinum, í bløðum ella lýsingum, eru ofta sera vakrar. Summar av hesum myndum eru upprunamyndir, men nógvar teirra eru viðgjørdar við telduforritum, áðrenn vit síggja tær, og kunnu tí geva okkum eina skeiva fatan av, hvussu lutir og fólk síggja út í veruleikanum.

Ofta eru myndir av fólkum viðgjørdar, soleiðis at fólkini eru klænri og vakrari, enn tey eru í veruleikanum. Hetta kann fáa okkum til at halda, at vit ikki eru nóg góð, sum vit eru.

Vit mugu tí altíð minnast til, hvussu nógv myndin av veruleikanum kann broytast, tá hon er viðgjørd í telduni.

## Heimauppgáva 1:

Tosið um, hvat tað merkir, at man viðger eina mynd. Hvat verður oftast broytt við myndum av fólkum?

## Heimauppgáva 2:

Tosið um, hví myndir, sum verða nýttar til lýsingar, eru viðgjørdar. Er tað:

- Fyri at gera heimin til eitt vakrari stað?
- Fyri at selja vørur?



Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

PRENT: FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705